JA

ØN

# Fyri og ímóti lønarlækking

## Niðan fyri nevna vit í stuttum tað, sum flestu tingfólk halda um at lækka lønirnar hjá tingfólki



**LØNARLÆKKING**

*Tinglimir halda ikki, at tað er nakað endamál, at teir lække sínar egnu lønir fyri at ganga undan sum góð fyridømi, sum álvarsligar sparingar skulu gerast*

**Magni Laksáfoss**
Eg haldi, at vit heldur skuldu givið løgtingslimum hægri løn, men aftur fyri skuldu vit so kravt, at teir ikki høvdu nakað annað arbeiði við síðuna av. Og so er mín áskoðan hon, at tinglimir hava alt ov vánaligar arbeiðsumstøður, so vit áttu heldur at minka tinglimatalið og givið teimum eftirverandi tinglimunum rímiligar arbeiðsumstøður við eitt nú einum skrivara, um tað so var til at deila.

**Bjarni Djurholm**
Eg haldi, at tað kundi loyst nógvar trupulleikar, um lønarlagið generelt varð lækkað, so vit millum annað fingu betri kappingarføri. Hendi tað, hevði tað verið upp á sítt pláss, at tinglimir gingu á odda, men at bara tinglimir fara 10% niður í løn ger ongan mun og gevur heldur onga meining.

**Kári P. Højgaard**
Vit sum eru í politikki eiga at ganga á odda sum góðar fyrimyndir. Tí havi eg als einki ímóti at lønirnar hjá okkum verða lækkaðar, áðren vit áleggja øðrum størri byrðar. Nøkur av grannalondunum hava gjørt tað sama.

**Edva Jacobsen**
Tá ein persónur verður valdur á ting og raðfestir tað arbeiðið, so er tað í lagi, at verða løntur hareftir. Er talan um generella lønarlækking, má Tingið eisini fylgja við, men eg haldi, at lønin heldur skuldi verið regulerað eftir innsatsi.

**Helgi Abrahamsen**
Var talan um eitt uppskot frá formansskapinum, so hevði eg atkvøtt ja. Hevði uppskotið hinvegin komið frá einum einstøkum tinglimi, so hevði eg mett tað sum populistiskt og atkvøtt nei. Hinvegin er spurningurin, um tinglimatalið ikki átti at verið skert.

**Marjus Dam**
Eg var ímóti at hækka tinglimalønirnar á sinni, og eg havði ikki hat trupulleikar við at fari niður í løn. Trupulleikin, sum vit eru í í dag er kortini, at vit lækkaðu ríkisveitingina, og tí eiga vit heldur at rætta tann feilin og prísregulera ríkisveitingina. Men fer alt tað almena niður í løn, taki eg undir við at Tingið eisini fer niður í løn.

**Edmund Joensen**
Eg vil gjarna verða við til at hjálpa um, har tað ber til. Men tá tað er sagt, er strangt neyðugt at lækka ting- og landsstýrismannatalið, og serliga átti landsstýrið at verið minkað niður í fimm aðaláð umframt løgmann.

**Bjørn Kalsø**
Heldur enn at tinglimir skulu fara niður í løn, átti tinglimatalið at verið minkað niður í 25. Lønin eigur at vera so mikið høg, at tað er tiltalandi hjá fólki at stilla upp til Løgtingið. Tað má verða eitt ávíst lutfall til í løn og arbeiði, men kostnaðarstøðið átti at verið lækkað.

**Alfred Olsen**
Eg haldi heldur, at tinglimatalið átti at verið lækkað, til dømis niður í 25. Annars haldi eg, at fólk skulu hava løn fyri tað arbeiði, sum tey gera.

**Sjúrður Skaale**
Vit skulu heldur lækka tingmannatalið. Í einum sangi spyr skaldið, Kári P um flest merkir besta ella barasta flest. Tað eru 42 landspolitikarar í Føroyum og tað er alt ov nógv.

**Hergeir Nielsen**
Fara allar almennar lønir niður, er tað ílagi at tinglimir eisini gera tað

**Karsten Hansen**
Vit skulu heldur lækka talið á aðalráðum. Tinganes fult av avlops-aðalstorum og akurát nú er ein settur afturat, hóast vit vita, at teir eru settir fyri lívið

**Bill Justinussen**
Skal tingmannalønin lækka sum ein undanførsla fyri at kunna fremja øll møgulig onnur inntriv á veikar bólkar í samfelagnum, er svarið nei. Týðandi politiskar avgerðir skulu ikki setast í sambandi við tingmannalønirnar. Men fara allar lønir niður, skulu tingmannalønir fylgja við.

**Bjørt Samuelsen**
Skulu almennar lønir skerjast, skulu tinglimir sjálvandi ganga á odda, men ikki einsamallir. Spurningurin um tingmannalønir má ikki fáa fólk at gloyma veruligu trupulleikarnar, sum eisini mugu loysast.

**Heðin Zachariasen**
Eg havi einki ímóti tí, sum ein part av at lækka allar almennar lønir.

**Poul Michelsen**
Hatta er eitt rímiligt krav, tað eigur at kunna gerast.

**Jákup Mikkelsen**
Tað hevði verið eitt gott signal at sent úr, sjalvt um tað gevur lítið bara at lækka lønirnar hjá løgtings- og landsstýrisfólkum. Allar almennar lønir áttu at verið lækkaðar.

**Anfinn Kallsberg**
Tað hevði verið eitt gott signal at sent út, men vit mugu hava alt fólkið við uppá lønarlækking, um tað skal muna. Hinvegin má lønin hjá løgtingsfólki ikki vera so lítið, at løgtingssessur verður valdur frá.

**Katrin Dahl-Jakobsen**
Hatta er eitt populististiskt uppskot, sum eg ikki havi hug at gera viðmerkingar til.

**Hans Pauli Strøm**
Vit mugu tosa um alt, sum má henda í heyst, og eg havi einki ímóti at skifta orð um lønarlagið, fíggjarkarmar og at fastfrysta pensjónir, lønir og veitingar.

**Gerhard Lognberg**
Tá ið alt annað má lækka, mugu lønirnar hjá politikarunum eisini lækka. Tá ið onnur kunnu liva við minni løn, kunnu vit tað eisini.

**Andreas S. Petersen:**
Skulu allar lønir niður, skulu løgtingsfólkalønirnar eisini niður. Annars er hatta eitt populistiskt uppskot.

**Mikkjal Sørensen**
Tiltøk mugu gerast, og fara lønirnar niður, skulu tingfólk eisini niður í løn.

**Eyðgunn Samuelsen**
Eg havi einki ímóti, at vit ganga á odda, men tað hevði bara verið symbolskt. Hinvegin má ansast eftir ikki at tileinkisgera hetta arbeiði, sum er fulltíðarstarv og meira enn tað.

| Tingfólk | Ja | Nei | Svarar Ikki |
|---|---|---|---|
| Sjúrður Skaale | | x | |
| Bjørt Samuelsen | | x | |
| Heini O. Heinesen | x | | |
| Bill Justinussen | | x | |
| Jenis av Rana | | x | |
| Hergeir Nielsen | | x | |
| Annita á Fríðriksmørk | | x | |
| Karsten Hansen | | x | |
| Høgni Hoydal | x | | |
| Heðin Zachariasen | | x | |
| Óli Breckmann | x | | |
| Poul Michelsen | x | | |
| Jákup Mikkelsen | x | | |
| Anfinn Kallsberg | x | | |
| Katrin Dahl Jakobsen | | | x |
| Hans Pauli Strøm | | x | |
| Gerhard Lognberg | x | | |
| Andreas Petersen | | x | |
| Mikkjal Sørensen | | x | |
| Eyðgun Samuelsen | x | | |
| Bjarni Djurholm | | x | |
| Alfred Olsen | | x | |
| Bjørn Kalsø | | x | |
| Edmund Joensen | x | | |
| Magni Laksáfoss | | x | |
| Marjus Dam | x | | |
| Helgi Abrahamsen | x | | |
| Edva Jacobsen | | x | |
| Kári P. Højgaard | x | | |
| John Johannesen | | | x |
| TILSAMANS: | 12 | 16 | 2 |

**Ikki at hitta:**
**Bergtóra Høgnadóttir Joensen**
**Tórbjørn Jacobsen**
**Kári á Rógvi**